GJALDSTOVAN

# Teldutilboð til Løgtingið

Í samband við at Løgtingið skal skifta teldur út, verður biðið um tilboð uppá Surface teldur.

Teldurnar skulu brúkast til løgtingsarbeiði og arbeiði í umsitingini hjá Løgtinginum.

Hervið verður biðið um tilboð uppá: 60 stk. Surface Pro 7 og 35 tilhoyrandi Microsoft dokkstøðir.

Minstukrøv til teldurnar eru:

- Intel Core i5
- 256 GB SSD Harðdisk
- 16 GB RAM
- Norðurlendskt/skandinaviskt **Signature Type Cover** tastatur
- Windows 10 Pro OEM stýriskipan
- 3 ára garanti. Um garantiið ikki er eins fyri allar lutirnar, skal tað vera útgreinað
- Mest loyvda útveganartíð er 30 dagar.

Um teldur skulu umvælast ímeðan teldan er undir garanti, skal veitarin, antin sjálvur ella ígjøgnum triðjapart, taka sær av at fáa hetta gjørt.

Tilboðini verða viðgjørd og sammett av keypara. Niðurstøðan av greiningini av innkomnu tilboðunum verður grundað á eina heildarmeting við denti á tey viðurskifti, sum eru nevnd í hesum skrivi. Keypari tilskilar sær rætt til ikki at taka av nøkrum av innkomnu tilboðunum.

Soleiðis vera tilboðini vigaði:

| | **%** |
|---|---|
| Prísur | 90 |
| Umframt minstukrøv [**1**] | 10 |

[**1**] Umframt minstukrøv, er tað sum teldan hevur umframt minstukrøvini omanfyri. Tað kann verða meiri RAM størri CPU o.s.fr. Ein meting verður gjørd um, hvussu nógv hvør eyka funktión telur.

GJALDSTOVAN | KVÍGGJARTÚN 1 | ARGIR | POSTBOKS 2009 | FO-110 TÓRSHAVN | FØROYAR
TEL +298 35 24 00 | GJALDSTOVAN@GJALDSTOVAN.FO | GJALDSTOVAN.FO

GJALDSTOVAN

Um vøran verður latin seinni enn til avtalaðu tíð, tilskilar KT Landsins sær rætt til at taka hettar við í viðgerðina, tá næsta útboð er til viðgerðar.

Tilboðið skal verða sent til ktskivan@gjaldstovan.fo og hava frámerkið "Teldutilboð til Løgtingið".

Umboð frá veitarum eru vælkomin at seta spurningar um veitingarætlanina og tilboðsgrundarlagið í síni heild, um ynski eru um at greina ávís viðurskifti nærri.

Slíkir spurningar skulu so vítt møguligt verða settir fram og viðgjørdir skrivliga, fyri lætt og ómakaleyst at kunna skjalprógva samskiftið.

Spurningar skulu stílast til:

Bjarni Fríðberg
bjarni@gjaldstovan.fo

Fartelefon: 79 24 93

Við hesum verður takkað fyri áhugan, og vit gleða okkum til at hoyra frá tykkum aftur.

Vinaliga heilsan

Gjaldstovan
KT Landsins